# Eldrapolitikkur 2025-2030

Í sambandi við at eldraøkið varð lagt til kommunurnar at umsita 1. januar 2015, varð eldrapolitikkur orðaður og samtyktur á býráðsfundi 11. desember 2014.

Fyri at røkka málunum í verandi eldrapolitikki, hevur verið arbeitt miðvíst við at framtíðartryggja eldraøkið, og at menna dygdina í tænastum og tilboðum í Heilsu-og umsorganartænastuni. Dygd verður býtt sundur í tríggjar partar. Organisatorisk dygd, faklig dygd og brúkarauppliváð dygd.

Síðani eru tilboð ment til eldri fólk í Tórshavnar kommunu, bæði tá ræður um heilsurøkt og umsorgan, bústovnar til røktarkrevjandi, heilsustimbran og fyribyrgjandi rørsluátøk, mentan og ítrív og aktivitetir á røktarheimum.

Í juni 2022 varð stór brúkara- og nøgdsemiskanning gjørd millum eldri fólk í kommununi, sum gevur ábendingar um, hvørji mál eru rokkin, og hvørji mál framhaldandi kunnu mennast.

Nú 10 ár eru liðin, síðani Tórshavnar kommuna fekk ábyrgd av eldraøkinum, verður mett, at tíðin er komin til at endurskoða verandi politikk, serliga við atliti at demografiskum broytingum í samfelagnum komandi árini.

Hendan endurskoðan av eldrapolitikkinum er eisini í samsvari við tilmælið frá arbeiðsbólki, sum varð settur at lýsa og greina avbjóðingar, vísandi til framtíðartrygging av eldraøkinum. Eitt av tilmælunum hjá bólkinum var at endurskoða eldrapolitikkin.

Heilsu- og eldranevndin avgjørdi á fundi í mai 2024 at fara undir tilgongdina at endurskoða eldrapolitikkin.

Í hesum sambandi varð byrjað við at skipa eina verkstovu í Tilhaldinum 21. mai 2024, har eldri fólk í Tórshavnar kommunu høvdu møguleika at koma við viðmerkingum og hugsanum um, hvat ein eldrapolitikkur eigur at innihalda.

Síðani er eldrapolitikkurin endurskoðaður, og niðanfyri standandi er úrslitið av tí arbeiðinum.

Politikkurin fyri tíðarskeiðið 2025 - 2030 leggur dent á virkni, sjálvbjargni, virðing, sjálvsavgerðarætt, tryggleika og nærleika, virkisføri og inklusjón, yrkisføri og góða leiðslu.

## Eldrapolitikkur

- Virkin og sjálvbjargin
- Virðing og sjálvsavgerðarrættur
- Tryggleiki og nærleiki
- Virkisføri og inklusjón
- Yrkisføri og leiðsla
- Demensvinarlig kommuna

## Virkin og sjálvbjargin

**At klára seg sjálvi, eisini tá ein eldist, er eitt aðalmál, tí sjálvbjargni er økt lívsgóðska. Eldri fólk skulu kunna gleðast um eitt virkið lív saman við familju og vinum og vera virkin í kommununi. Tey skulu hava møguleika at nýta tilboð innan mentan, ítriv og ítrótt, sum ein náttúrligur partur av gerandisdegnum.**

**Heilsufremjandi átøk í mun til sjúku og einsemi skulu vera í miðdeplinum við bæði heilsufakligum og sosialum átøkum. Fokus skal vera á kunnleika til heilsugóðan kost og lívsstíl, tí sjúkufyribyrging er ein fortreyt fyri áhaldandi at vera virkin og sjálvbjargin. At vera virkin, saman og hugbundin.**

***Vit*** *vilja arbeiða heilsufremjandi og stuðla teimum, sum hava størstan tørv á hjálp í heiminum við at fremja tiltøk og endurmenning fyri at varðveita sjálvbjargni heima sum longst. Vit hjálpa og veita ráðgeving um, hvussu tillaging av gerandisdegnum kann gera tað gjørligt at vera virkin og sjálvbjargin, so leingi sum til ber. Vit bjóða fyribyrgjandi heimavitjan til borgarar eldri enn 75 ár.*

*Vit skipa fyri endurmenning og nýtslu av vælferðartøkni, og veita tilboð og tænastur við grundarlagi í at kostur, virksemi, rørsla, røkt og umsorgan eru javnsett og eins týdningarmikil. Vit fylgja ráðum og tilmælum frá Heilsustýrinum.*

*Vit arbeiða fyri fjølbroyttum bústaðarmøguleikum til teirra, sum ynskja at búleikast í minni og rørsluvinarligum bústøðum og stremba ímóti, at hjún/pør kunnu búgva saman sum longst.*

## Virðing og sjálvsavgerðarrætt

**Tað er ymiskt, hvussu fólk ynskja at liva. Eitt virðiligt lív er at vera hoyrdur og hava rættindi til at taka egnar avgerðir, at ráða í egnum heimi og yvir sær sjálvum, og taka støðu til tað, sum hevur ávirkan á gerandisdagin. Eitt virðiligt lív er eisini at hava góðar fysiskar umstøður, og at hava møguleikan at tillaga umstøðurnar eftir avbjóðingunum.**

***Vit*** *vilja møta fólki sum serstøk menniskju og tillaga virksemið til tann einstaka. Vit virða, at einstaki persónurin sjálvur nágreinar, hvat eitt gott lív er, og hvørji tilboð hava týdning fyri tann einstaka.*

*Vit kunna um hvørjar møguleikar einstaka menniskja hevur, alt eftir hvør støðan er, og nýta heilsufaklig sjónarhorn at meta um, hvørji átøk eru til gagns. Avvarðandi hava virknan leiklut, tá tann aldrandi ynskir tað, men samstundis virða vit sjálvsavgerðarrættin at takka nei til tilboð.*

*Ynskir og mál hjá einstaka fólkinum er grundarlag fyri góðum samstarvi, bæði við tann aldrandi og avvarðandi.*

REV 02.04.2025

## Tryggleiki og nærleiki

**Tað hevur týdning at kenna tryggleika og nærleika í gerandisdegnum. At vera partur av felagsskapinum, og at liva eitt lív, har tað er skjótt og lætt at fáa samband við fakfólk og avgreiða umbønir um stuðul og fáa neyðuga hjálp. Sum fólk eru vit ymisk, og hava ymiska fatan og tørv á tryggleika.**

**Tá sjúk og veik nærkast endanum á síni livitíð, skal tryggleiki og nærleiki skapa umstøður fyri einum virðiligum deyða.**

***Vit*** *vilja gera tað lætt og einfalt at koma í samband við Heilsu- og umsorganartænastuna. Vit eru greið í orð og talu, og fólk fáa skjótt og greitt svar um tænastur og tilboð, sum kommunan veitir. Dentur verður lagdur á opinleika og at veita neyva kunning, bæði persónliga og á talgildum miðlapallum, soleiðis at eldri fólk og avvarðandi uppliva eina heildartænastu.*

*Vit eru tilvitaði um at møta fólki har tey eru, og at gera okkara til, at fólk kenna seg trygg.*

*Vit veita dygdargóða tænastu til teirra, sum hava tørv á tí. Vit veita palliativa røkt seinastu livitíðina, og skapa umstøður, so at bæði tann eldri og avvarðandi kenna seg so trygg sum til ber, í støðuni.*

## Virkisføri og inklusjón

**Arbeiðsmarknaðurin hevur tørv á starvsfólkum við hollum royndum, og eldri fólk, sum eru væl fyri, skulu kunna vera á arbeiðsmarknaðinum við tillagaðum arbeiðsumstøðum.**

**Fólk við skerdum førleikum skulu hava somu møguleikar at luttaka í samfelagnum sum onnur. Inklusjón er aðalmál, og virksemi og ítriv til eldri fólk, skal eisini fevna um møguleika hjá teimum við virkistarni at luttaka. Tá býarætlanir verða framdar, og eldra- og røktarbústaðir verða bygdir, skal havast í huga, at skipa ætlanir og bygging við atliti at ymiskum tarni, ið kann raka eldri.**

***Vit*** *veita góðar umstøður fyri at halda fram í starvi eftir ynski hjá eldri starvsfólki við at veita umstøður og møguleika fyri niðursettari arbeiðstíð eftir pensjónsaldur. Vit stuðla teimum, sum fara av arbeiðsmarknaðinum í at brúka og framhaldandi menna førleikar sínar í nærumhvørvinum, og eggja til at hjálpa javnlíkum at vera virkin við at brúka teir møguleikar, sum kommunan bjóðar, og at eggja til at vera sjálvboðin.*

*Vit hava starvsfólk, sum veita kunning og kvalitativa ráðgeving til eldri fólk og avvarðandi, sum liva við ymiskum tarni í gerandisdegnum. Kunningin skal eisini fevna um demensvinarlig átøk og møguleikar fyri røkt. Vit ráðgeva um innrætting í heiminum, og arbeiða við fokus á atkomuviðurskiftum í kommununi. Vit tryggja virðiligar umstøður í ferðsluni og í býnum til fólk við førleikatarni. Hetta verður gjørt við greiðum samskifti og nýtsluvinarligum amboðum, soleiðis at tey kenna seg trygg í samfelagnum.*

## Fakligir førleikar og leiðsla

**Fólk skulu fáa tilboð um tænastur á høgum fakligum yrkisførligum stigi. Tað krevur dugnalig starvsfólk, sterka og sjónliga leiðslu og fíggjarligt skynsemi. Starvsfólk skulu helst hava heilsufakliga útbúgving og góðar samskiftisførleikar. Tey skulu áhaldandi skúlast til øktar fakligar førleikar við grundarlagi í heilsufakligari gransking og nýggjastu vitan á økinum.**

***Vit*** *hava sum aðalmál at veita eina góða heildartænastu til borgarar í Tórshavnar kommunu, og arbeiða støðugt við at menna organisatoriska, fakliga og brúkaraupplivaða dygd. Vit arbeiða við at rekruttera, varðveita og økja um yrkisligar førleikar og royndir á eldraøkinum. Vit hava eina sterka organisatoriska og yrkisliga leiðslu, sum arbeiðir við skynsamari fíggjarstýring, og hevur fokus á at rekruttera og halda fast í einum støðugum starvsfólkahópi, sum kann vitanardeila og veita frálæru innan útbúgving og starvsroyndir. Samstundis eru vit fegin um at fáa nýggj óroynd starvsfólk. Hesi fáa góða innleiðslu- og hóskandi upplæring til at megna arbeiðsuppgávurnar. Vit menna yrkisligar førleikar og tryggja, at vitanin verður nýtt á bestan hátt.*

*Vit arbeiða út frá einum empiriskum/ sannroyndum grundarlagi og leiðreglum, sum tryggja trygd og dygd á tænastum og fylgja ásetingum og lógarkrøvum. Vit hava eina samanhangandi dygdarmentan, har øll hava samábyrgd fyri dygdarstigum í bygnaðinum, tilfeinginum og tænastunum, og alsamt eru íðin eftir at hækka dygdarstigið.*

*Vit arbeiða við góðum kropsligum og sálarligum arbeiðsumhvørvi, har hjálpartól og vælferðartøkni stuðla undir virknum arbeiðisdegi.*

*Vit luttaka í granskingarverkætlanum innan eldraøkið og eru útbúgvingarstaður fyri lesandi. Vit hava næmingar í starvsvenjing og fremja átøk í skúlum og úti í samfelagnum, sum varpa ljós á eldraøkið sum fakligur og spennandi geiri.*

*Vit veita góða innleiðslu, tá starvsfólk byrja í starvi, fyri at tey skulu trívast og megna tær arbeiðsuppgávur, tey skulu fremja.*

## Demensvinarlig kommuna

**Minnisveikir borgarar skulu hava somu møguleikar at luttaka í samfelagnum sum onnur. Inklusjón er aðalmálið. Virksemi og ítriv til eldri fólk, skal fevna um møguleika hjá minnisveikum at luttaka, og skal veita amboð at megna gerandisdagin eins og áður so leingi sum til ber. Fokus skal vera á kunning um demens. Tá býarætlanir verða framdar, skulu ætlanirnar taka støði í einum demensvinarligum umhvørvi.**

***Vit*** *menna starvsfólk við fakligum førleikum innan demens og veita kunning og kvalitativa ráðgeving til borgarar og avvarðandi, sum liva við demensi í gerandisdegnum. Kunningin skal fevna um demens og demensvinarlig átøk og møguleikar fyri røkt. Vit ráðgeva um demensvinarliga innrætting í heiminum, tí smærri broytingar kunnu gera stóran mun fyri at varðveita gerandisdagin sum longst. Vit skipa fyri demensvinarligum bústøðum og røktarplássum, og tryggja virðiligar umstøður til minnisveikar borgarar í býnum og í ferðsluni við greiðum samskifti og nýtsluvinarligum amboðum, sum fær borgaran at kenna seg tryggan í samfelagnum.*